# Lógir

## Sjóvar Fornminnasavns

FØROYA FORNMINNISSAVN
Komið: 28 JAN. 2010
Sræð: sign.:
Málsviðg.:

§1 Navn felagsins er Sjóvar Fornminnasavn.

§2 Endamál savnsins er í Sjóvar kommunu, at varðveita fornminni, hús og fornlutir og at savna upplýsingar, myndir o.a. av bygdasøguligum týdningi.

§3 Sjóvar Fornminnasavn verður stýrt av eini 3-manna nevnd, soleiðis at Sjóvar Fornminnafelag velur tveir limir og Sjóvar kommuna ein. Nevndin skipar seg sjálv. Nevndin stendur aðalfundi Sjóvar Fornminnafelags og Sjóvar kommunu til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

§4 Nevndin syrgir fyri at fáa savnið góðkent sum stuðulssøkjandi bygdasavn og at reka savnið sambært løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986.

§5 Rakstrarætlan verður løgd fyri landsantikvarin til góðkenningar. Roknskaparárið er álmanakkaárið. Grannskoðaður roknskapur verður saman við frágreiðing frá farna árinum latin landsantikvarinum at góðkenna.

§6 Gevst savnið við virki sínum, verður farið fram eftir grein 3, stk. 3 í løgtingslóg nr. 17 frá 9. mai 1972 sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986.

§7 Hesar viðtøkur fáa gildi, tá tær eru samtyktar av Sjóvar Fornminnafelag og Sjóvar kommunu og góðkendar av landsantikvarinum og Føroya Landsstýri. Tær broytingar, sum verða gjørdar í viðtøkunum, skulu somuleiðis góðkennast av landsantikvarinum og Føroya Landsstýri.

Soleiðis samtykt á aðalfundi í Sjóvar Fornminnafelag tann 23. apríl 2009

| | | |
|---|---|---|
| Malena Thomsen | Elin Henriksen | Kári í Garði |
| forkvinna | skrivari | kassameistari |
| | | (umboð fyri Sjóvar Kommunu) |